# Renna fyri heilsuni

**Heilsurenningar eru væl umtóktar millum fólk. Farna vikuskiftið runnu 300 fólk fyri heilsuni í Klaksvík - teirra millum var landsstýrismaðurin við heilsumálum**



Nógv fólk var við til heilsurenningina í Klaksvík

## Heilsurenning



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo
myndir: Guttorm Sørensen

Ítróttarfelagið Treysti er saman sínum sponsorum farið undir heilsurenningar í Klaksvík. Hetta var roynt í fjørsummar og eydnaðist so væl, at tiltakið verður endurtikið í ár.

Leygardagin var fyrsta renningini í tiltakinum, sum kallast "Renn fyri heilsuna", og sera nógv fólk var við í fyrstu renningini.

Teirra millum var Hans Pauli Strøm, sum umframt at verða landsstýrismaður við heilsumálum eisini er ein íðin rennari.

Fólk runnu ella gingu frá SportMaster mitt í býnum í Klaksvík, út á Skarðhamar og heimaftur. Og aftaná rennignina bar til at fáa eitt gott prát í góðveðrinum.



*Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, var við í renningini, og hann fekk sær eisini okkurt prát í góðveðrinum*



*Karl Martin Samuelsen var væl nøgdur við tiltakið*



*Summi høvdu fulla ferð á allan teinin*



*Fólk vóru í góðum lag, tá ið tey komu aftur á mál*



*Eftir renningin bar til at fáa sær eitt prát og okkurt leskandi afturvið*